VIÐMERKINGAR

# Teir leggja á har garðurin er lægstur

**Jákup Joensen,**
*Sumba*



Tað var nú ótrúliga gott, at vit fingu eina politiskt óhefta rás, soleiðis at vit fáa fylgt við í tí, sum fer fram innan tingsins gátt. Vit hava skjótt funnið útav, at tað, sum útvarp og bløð bera fram, ikki er í samsvar við tað, sum veruliga fer fram, og vit hava ansað eftir, at mál og menn, sum ikki passa røttu skógvarnar, verða tagd burtur av fjølmiðlum okkara.

Henrik Old hevur allar dagar verið sum ein opnahjallur. Fullur í tíðindum um alt og øll, og altíð komin út gjøgnum allar miðlar. Men nú síðan vit fingu beinleiðis atgongd til løgtingið gjøgnum sjónvarpið, ella tingvarpið, nú sær verðin munandi øðrvísi út, enn vit hugsaðu okkum tað – og nú kenna vit okkum villeidd, so tað munar.

Undir viðgerðini av fíggjarlógini lovaði Henrik Old, at vágbingar skulu koma bæði at nísta og pípa. Skúla skulu teir so ongan fáa, tað skuldi hann syrgja fyri. Og hann helt orð. Vág-bingar bæði nísta og pípa, og teir hava ongan skúla fingið.

Børn sum ganga í skúla tíma ikki at arbeiða fisk, segði álitismaður Javnaðarfloksins í vinnumálum, og tí er tað burturvið at lata tey ungu ganga í skúla. Tey skulu hava so lítla skúlagongd sum møguligt, annars rýma tey frá okkum, segði maðurin, sum sjálvur er rýmdur, og sum ikki brýggjar seg um at búgva millum okkum suðringar.

So skuldu vágbingar fáa eitt ellisheim var næsta boðið, men at teir skuldu gjalda tað sjálvir, og at hinar kommunurnar skuldu gjalda hetta heimið í Vági eisini, ja, tað skulkaði hann sær undan at siga nøkrum. Tað sum um galt, var at ríva niður ein skúla, ríva niður ein varða, ið aðrir høvdu laðað.

Og oyggin liggur øll í andaleypi og svartasta vónloysi. Fyri fyrstu ferð nakrantíð eru politisk átøk framd fyri at drepa niður tað, sum var farið at spretta, samstundis sum man ikki hevur orkað, dugað ella viljað gjørt nakað ístaðin fyri.

Teir søgdu seg koma við eini Suðuroyarætlan, sum kortini einki kjøt var á, og sum einans var ein lýsing av tí sum aðrir høvdu gjørt frammanundan. Og tað ringasta av øllum er so tað, at vit umvegis tingvarpið hava hoyrt fleiri samgongumenn siga seg einki kenna til hesa Suðuroyarætlan, og tí ikki taka undir við henni.

Hví tey avgerandi tíðindini alla tíðina verða tagd burtur av fjølmiðlunum, eitt nú av útvarpinum, ja, tað er okkum ein gáta.

Tað var í stórum spenningi, at vit suðringar settust at lurta eftir orðaskiftinum um at byggja ein umsitingarbygning á Krambatanga seinasta fríggjadag. Hetta var so sanniliga eitt uppskot um økismenning, um at flyta almenn arbeiðspláss til Suðuroyar.

Men Henrik Old var skjótur at manna ta gardtuna, sum bara skuldi skjóta niður tað, sum aðrir royndu at byggja upp.

Útvarpið hevur verið á gosi í allan vetur, um tey vælsignilsi hendan samgonga vil veita Suðuroynni, men so eiðasørt vit hava hoyrt eitt orð, nú konkret uppskot um økismenning og almenn arbeiðspláss skuldu stovnsetast í somu oyggj.

Útvarpið hevur ikki grett eitt orð um, at uppskotið var framlagt, ei heldur at tað kom til viðgerðar. Fingu vit ikki ein møguleika fyri at fylgja við í tingvarpinum, so vistu vit einki.

Men tann møguleikan brúktu vit so nú fríggjadagin. Har fingu vit so eisini kunnað okkum um, hvussu óendaliga nógva orku, ið Henrik Old og samgongan leggur í at karva niður øll skilagóð uppskot til bata fyri almenn arbeiðspláss í Suðuroynni, uttan at vera før fyri at skapa nakað sjálvi.

Eitt dømi av mongum var uppskotið um at brúka einar 2-3 mió. kr. sum vóru játtaðar Øravíkar-Hov bergholinum til onnur arbeiði í Suðuroynni. Ikki talan um, segði Henrik Old, sum nærum fær berserkagongd, hvørja ferð okkara menn royna onkur frambrot fyri Suðuroynna.

Tað var ikki arbeiðandi úti um veturin, segði javnaðarmaðurin, sum legði trýst á tingið um at flyta pengarnar vestur í Vágar. Um tey hava øðrvísi vetur har vesturi er ikki gott at vita, men hetta er besta gerð eg havi gjørt í lívinum, hoyrdu vit Henrik Old siga, samstundis sum tað frættist, at Landsverk hevði sagt upp 5-6 monnum í Suðuroynni av teimum 8-10, sum mistu arbeiðið kring alt landið hendan veturin.

Fyri 10-15 árum síðan var tann stóra avreiðingin í gongd. Toll- og skatt, løgregla, strandferðsla o.a.m. er flutt úr syðru helvt, og manna millum gekk tosið um, at nú manglaði Henrik Old bara at flyta páskirnar norður á Tvøroyri eisini.

S o langt kom tað tó ikki, og gott tað sama, men nú hann aftur hevur fingið vald, kennir hann sær ikki afturhald.

Meðan aðrir hava hálað, hevur Henrik Old lorað. At lora ein heilan skúla aftur undan hekkuni er eitt slag av heimsmeti í undirbrotligum býttiskapi og hevndarhugi mótvegis Tjóðveldisflokkinum.

Vit kenna mannin aftur frá Sumbiartunlinum. Hesin tunnil var valagn hjá honum og Javnaðarflokkinum eitt mannaminni líka til Tjóðveldisflokkurin kom framat og støðgaði lyftunum og framdi verkið.

At selja Teistan var eitt mistak. Vit hildu stóra afturstigið vera, at nú fór útflutningurin úr Suðuroynni fyri skeyti, meðan Henrik Old venaði seg um, at nú fekst ikki fatur á bíligum karamellum at egna við.

Skattalætta til tey ríku fyrst og fremst. Fólkið skal koma síðst, er nú verkætlanin hjá hesum talsmanni fyri meiniga mannin. Tær høgu inntøkurnar, har hann býr, fáa skattalættan, meðan tær lægru inntøkurnar her um okkara leiðir sita við svangan munn, og fingu ongan skattalætta.

Frælsi, javnaður og brøðralag var lopfjølin inn á ting, men innanfyri tinggáttina vendi rangan skjótt út. Frælsi er ein býur í Kina, og sama kann sigast um javna, brøðralag og arbeiðspláss.

Undir undanfarnu samgongu, tá suðringar áttu ein samgongumann, vassaðu teir í almennum arbeiðsplássum á fleiri almennum verkætlanum, samferðsluhavnini, djúphavnini og miðnámsskúlanum. Tíbetur vóru Henrik Old og teir ov seinir at støðga havnaløgunum, men tíverri lukkaðist teimum at støðga skúlanum, tá formarnir skuldu setast upp.

Hetta er størsta níðingsgerð móti ungdómi okkara, men so sera, sera eyðkent fyri Javnaðarflokkin at leggja á, har garðurin er lægstur. Vit sóu tað við skattalættanum móti teimum minni mentu og vit síggja tað aftur við skúlaforboðnum móti ungdóminum.

Skamm fái tykkum fyri niðurbrótandi verk tykkara.

# Aftursvar til Tórmódur Stórá

**Ólavur á Heygum**

Fyrst má eg undrast, at hesin maður lesur mína grein, sum ein vissur harri lesur tað heilagu bók.

Harra Stórá, tað er ikki sum tú skrivar "Hansara stevna í Tysklandi", sum talan er um, men eina Norðurlanda rógvi- og mentunarstevnu, ímillum danir, sviar og føroyingar sum tú ikki tekur uppá mál, soleiðis sum tú ikki hevur virðing fyri teimun, sum vóru við til fyrireikingarnar. Til tað, sum tú kallar "hansara stevna í Tysklandi" vóru medfyrireikarnir hesir: Róðrasamband Føroya við Jóhannis Joensen, Róðrafeløg á Tvøroyri. Løgmaður Jóannes Eidisgaard og borgarstjóri Kristin Michelsen, hildið røður.

So sipar tú til, tá ið skrivið um "trøllið, sum kom undan kavi". Her fert tú eisini skeivur ella vil ikki halda teg til evnið. Tað var kappróðurin á Bryggen við Føroyahúsinum, sum eg skrivið um. Mær vitandi hava ongir bátar róð kapp á Vesterbrogade vid mál á nr. 17 A. Hvat er hattar fyri tvætl, Sjálvandi skal Føroyahúsið hava sína mentan í frið á Ólavsøku har ella á Bryggen. Tað hevur ongin haft nakað ímóti. So sipar tú eisini til kappróður á NorðurAtlantisku Mentunarstevnuni. Tú fylgir illa við. Tað var bert ein bátur sum róði tá, og tað var Tvørábáturin, sum róði kapp um seg sjálvan. Handan var ov íýlig harra Stórá.

Hald teg til evnið, sum skrivað verður um. Tað eru bátarnir, sum tit leggja hald á, sum eru trupulleikarnir, at náa eina viku aftaná, sum skulu koyrast 500 km.

Tey sum skula gera fyrireikararbeiðið, eru somu fólk frá róðrafeløgunum, sum gera róðrastevnuna í Ishøj og kanska Róðra- og Mentunnarstevnu 2006 í Svøríki. Alt skal fyrireikast áðrenn summarferiu, sum byrjar 20. juni. Hava tit onga føling fyri, hvussi fólk fyrireika ella taka tit tað fyri vist, at onnur gera tykkara arbeiði. Tað var just hendan grundgeving til áheitanina frá mær, um at halda ólavsøku vid kappróðri annað hvørt ár. Aðra staðni gera fólk stevnur annað hvørt ár í sama umhvørvi ella høvudstaðnum. Til dømis verður jóansøka hildin annað hvørt ár á Tvøroyri og Vági. At hava ólavsøkuhald á hvørjum ári kann viðføra, at ikki so nógv koma til Ishøj, tá ið Færø Regatta verður í juni. Tað sigst, at tað vóru nógv minni fólk í fjør enn tað plagar at vera.

Tað verður eisini skrivað um, at tá ið eg leggi á leiðarin í Føroyuhúsinum fyri manipulering ímóti mær og sum grundgeving nevni ósemju í felagnum. Hvat heldur tú ger ósemju. Tað er just hesin leiðarin, sum ger tað, við at senda brøv út til limirnar ímóti mær, at eg innkalli til eykaaðalfund og mangt annað. Hetta er ikki nøkur grov skuldseting, men ein avdúkan, hvussi leikur er farin fram til tú kallar "at smekka vid hurðini, men sum eit gamalt orðatak sigur "sannleikin er illa lýddur".

Tú nevnir at tað, atmín kæra hevur verið alment viðgjørt í Føroyhúsinum, ikki er rætt. Hvussu ber tað til, at ein pesónur ringir til mín og spyr, um eg havi sent kæru til Mentarmálarráðið. Hetta tí hann varð spurdur undir týsdagsdøgverðanum í Føroyhúsinum, áðrenn nakað skriv var komið í bløððni, um hann hevði hoyrt, at Ólavur á Heygum, hevði sent kæru um Føroyahúsid. Hann spyr so aftur um ‚hvar hetta var komi frá. Hin svarar aftur, at tad hevði Martin Fjallstein fortalt honum. So spyrji eg. Er tað ikki tagnarskylda hjá teimun, sum hava málið um hendi, til málið er avgreitt? Hevur Martin Fjallstein sjálvur haft málið um hendi?

Tú undrast, hví eg ikki havi vent mær til nevndina. Harra Stórá hevur tú ikki lisið, at eg sendi tað til vidgerðar av umboði hjá Mentamálaráðnum í Umboðsmannanevndini í Føroyhúsinum. So skal eg eisini viðganga, at eg hevði eitt ánilsi til tín persón, at tú fór ikki, at verða óheftur í hesum málið. Soleiðis í slíkum førum, fari eg altíð til høvdið og ikki til halan.

Eg má sanniliga eisini siga, at mín meting var røtt. Sjáldan havi eg sæð so einvísa skriving sum svar av mínari grein. Her er bara eitt áhugamál, og er tað at taka Føroyahúsid og leiðaran í verju.

So sigur tú, at øll feløgini vóru við til tann fyrsta fundin sum var í fjør vár og nevnur Neystið. Aftur skeivur. Eg var til tann fyrsta fundin. Har var ongin frá Neystinum møttur upp. Lesur tú ikki fundarfrágreiðingar ?

Nú vit tosa um Ólavsøkuhaldid í fjør á Bryggen, kann ein eisini undrast, hvat bleiv tann fíggjarliga støðan. Fleiri av gestunum søgdu mær frá, at tey vórðu biðin um at keypa øl og spiritus frá Martin Fjallstein, tí avlopið fór til feløgini. Enn er eingin roknskapur almennur, hví? Enn hava eingi feløg fingið avlop, hví? Hevur Umboðsmannaráðið í yvirhøvur nakað eftirlit við Føroyahúsinum ?

At enda má eg eisini ásanna, at tað er harmuligt við bladtjaki. Í 18 ár havi eg lagt alla mína orku fyri at fremja tann føroyska bátin vid kapprói í útheiminum og uttan sjólvrós fingid tað, sum á donskum verður kallað eina "ekspertise" við at finna gróðrabotn fyri tiltøkum, sum vit góðu landsmenn í Føroyum kunna fegnast um og vera saman um. Tá ið so onnur fólk seta meinbogar fyri tad virki, sum eg veit eg kann útinna, fyri at siga tað akkurat, sum er vid øvint, verður man harmur og má fáa luft. Tað verður kanska hildið av onkrun, sum grovar atfinningar, men sum áður nevnt. Sannleikin er ofta illa lýddur.